

Bilstøðin Taxa var í hesum bygninginum í Lucas Debesargøtu frá 1945 til 1952




Lýsing hjá bilstøðini Taxa



Andras Samuelsen (1873-1954) var løgmaður í Føroyum frá 1948 til 1950



Andrew Djurhuus bilførari (1920-1999) koyrdi á bilstøðini Taxa. Hann var ein av stovnarunum av bilstøðini Auto í 1952




Bilurin hevði eitt føroyskt flagg framman (modellmynd)

um bilin fyri at verða koyrdur heimaftur úr kirkjugarðinum.

Tá jarðarferðin var yvirstaðin, helt bilførarin tað ikki vera orsøk til at hava flaggið í hálvari stong.

Ístaðin fyri at fáa tað aftur í rættlag, tók hann tað burtur av bilinum, og - leggur bilførarin aftrat - Andras Samuelsen bað meg ikki um at koyra flaggið burtur.

Hendan hending vísir bara, hvussu eymt flaggmálið var tá í tíðini, og hvussu lítið skuldi til fyri at slíkar misskiljingar kundu koma fyri.

## Bilførarar koyra við stívari kenning

Tað sær út til at tey høvdu eisini trupulleikar við rúsdrekkakoyring fyrr. Fótgangari spyr blaðstjóran á Dagblaðnum um hvat kann gerast við bilførarar sum koyra við stívari kenning ella meira. Bilar koyra við meira ella minni fullum monnum við rattið.

*Í Dagblaðnum 11. juni 1948 stendur undir Spurteigurin soljóðandi fyrispurningur. Yvirskriftin ljóðar:*

### Um rúsdrekkakoyring - koyra við meira ella minni fullum monnum við rattið

Harra blaðstjóri, hvat kann gerast við tað, at ein ofta er við at koma illa fyri, tí bilførarar koyra bil við stívari kenning ella meir? Kann tað verða loyvt at bilar ferð eftir ferð - t.d. sunnukvøld - koyra við meira ella minni fullum monnum við rattið.

*Undirskrivað: Fótgangari*

*Blaðstórin á Dagblaðnum svarar:*
Tað er ikki loyvt at koyra bil við kenning, enn minni tá menn eru fullir.

Allarstaðir verða fólk, ið eru drukkin, hart sektaði um tey koyra bil.

So vítt vit vita, og sum dømi hava verið um, verða heldur ikki fingrar lagdir ímillum, tá ein maður kemur fyri rættin her fyri slíka ger.

Um so skuldi verið, at menn koyra bil við kenning, og politiið ikki ger nakað við tað ella ikki ansar eftir tí, mega fólk sjálvi melda tað - verður tað ikki gjørt, kann einki verða bøtt her. –

Tá vanlukkan er hend er tað ov seint. Vit kunna samstundis skoyta uppí, at bilferðslan í Havn eigur at verða umskipað - men tá má gongufólkið eisini lærast til at yvirhalda reglarnar.

Ongastaðni í heiminum ýla bilarnir sum her - um bæði gongufólk, súkklistar og bilar yvirhildu ferðslureglurnar var henda ýlingin óneyðug.

*Undirskrivað: Blaðstjórin*

## Akfør í Føroyum í 1948

### Í 1948 vóru tilsamans 590 akfør í Føroyum

**Bilar, motorsúkklur og onnur akfør pr. 1. januar 1948**

| | |
|---|---|
| Tórshavn | 220 akfør |
| Argir, Hvítanes og Hoyvík | 16 akfør |
| Streymoyar sýsla | 46 akfør |
| Eysturoyar sýsla | 84 akfør |
| Norðuroyar sýsla | 52 akfør |
| Vága sýsla | 59 akfør |
| Sandoy | 12 akfør |
| Suðuroy | 101 akfør |
| **Tilsamans** | **590 akfør í Føroyum í 1948** |